# MÆR DÁMAR BEST Í FØROYUM

**TRIVNAÐUR** – Nei, góði, kom ikki so nær andlitinum hjá mær við myndatólinum. So fer man bara at síggja alt so væl! Orðini eigur 72 ára gama Martha Larsen, sum hevur búð í Føroyum í hálva øld. – Tú veit. Hóast eg føli meg unga og raska, so kann ein ikki krógva seg fyri aldrinum, sigur Martha, sum upprunaliga er ættað úr lítlari grønlendskari bygd, men sum í dag ikki kundi hugsað sær at búð nakra aðrastaðni enn í Føroyum.



> » Altso, Martha, góða. Um tær leingist aftur til Grønlands, so haldi eg at tú skalt fara heim aftur. Men so legði hann aftrat: Kom aftur um tvey ár!

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

**Havn:** Telefonin ringir heima hjá hjúnunum Marthu og Dánjal Larsen.

Hon er skjót at taka telefonina, og er líka so skjót at geva manninum hornið, tá maðurin í hinum endanum sigur seg vera frá Sosialinum. So má tað vera til Dánjal.

Men tað er tað ikki hesaferð, í øllum førum. Telefonin er nevniliga ætlað Marthu.

– Ætla tit at tosa við meg? Um Grønland? Tja, eg veit ikki, er Martha skjót at svara. Eftir eina løtu verður svarið meiri játtandi: -OK, tað man vera í lagi. Nær koma tit?

> » Heilsan er framvegis góð, hóast eg verði 73 í september. Men eg tími framvegis væl at arbeiða

Røddin á manninum, tí 79 ára gamla Dánjali hoyrist í bakgrundini. Tey bæði hava livað eitt langt lív saman, og nú í ellini njóta tey samveruna hvørt við annað í hugnaligu og vælsnikkaðu íbúðini á Landavegnum.

– Eg kom her sum ung genta, og havi trivist her frá fyrsta degi. Tá eg havi ferðast aftur í heimlandi mínum, Grønlandi, so havi eg altíð longst aftur til Føroyar, her eg havi bæði børn og ommubørn.

– Eg má bara viðganga tað, at mær dámar betur í Føroyum enn í Grønlandi, sigur Martha sum verður 73 ár í september mánaði í ár.

Sosialurin hevur sett teimum stevnu ein vindharðan dag í farnu viku. Ein stevna, ið eisini førdi hana oman á fyrrverandi arbeiðspláss sítt, Bacalao á vestaru bryggju.

## Tosaðu um føroyingar

Tað eru helst ikki mong ið kennast við lítlu grønlendsku bygdina Atangmik – ella Atammik, sum hon eitur í dag – ið liggur nakað norðanfyri grønlendska høvuðsstaðin, Nuuk.

Tá Martha vaks upp her í 40'unum og 50'unum livdi fólkið av tí ið sjógvurin gav. Fólkatalið lá um tey 300, teirra millum tey í húsinum hjá teirri ungu Marthu Josefsen.

Hóast bygdin var lítil, var kortini skúli í bygdini, og her gekk hon til hon var 14 ára gomul. Hetta var í tíðini, tá børnini bert lærdu grønlendskt mál í skúlanum, og tí hevur Martha ongatíð lært seg at tosa danskt.

Atammik er framvegis í dag ein fiskivinnubygd, men tað vóru eisini onnur størv og tænastur her. Mamma Marthu starvaðist sum jarðarmóðir, og vóru møðgurnar báðar ofta úti og hjálptu børnum til verðina.

Hetta helt á eina tíð, men Martha hevði kortini eitt ynski og ein longsul um at sleppa út í verðina, og síggja okkurt annað enn heimbygdina. Sum sagt, so gjørt, og soleiðis bleiv tað til tað, at hon fyrst fekk arbeiði í Nuuk og seinni í eini aðrari kendari fiskivinnubygd Toqqusap – í dagligari talu Tokusak - ið liggur ikki so langt norðanfyri heimbygd hennara.

– Eg hevði hoyrt fólk tosa um allar hesar føroyingarnar, sum fiskaðu her og sum arbeiddu her. Og tá eg so sjálv kom til Tokusak hitti eg eisini á fyrsta sinni føroyingarnar, sum róðu út her, greiðir hon frá.

Millum teir mongu føroyingarnar sum arbeiddu á landi hetta árið (1959), var ein ungur og raskur arbeiðsmaður og hentur flekjari úr Porkeri – Dánjal Larsen, sum síðani skuldi koma at broyta restina av hennara lívi.

– Hann arbeiddi sum flekjari á sama virki sum eg. Arbeiðið var soleiðis skipað, at vit vóru nakrar sum rivu fiskin um, meðan Dánjal og aðrir mans trillaðu fiskin út úr skúrinum. og yvir í ein annan skúr, sigur Martha við einum brosi.

Og hon leggur aftrat: – Jú, eg fekk gott eyga á henda føroyingin har. Tað var okkurt serstakt við Dánjali, sum var nøkur ár eldri enn eg.

## – Martha, kom aftur!

Tey høvdu ikki verið saman í meiri enn slakar tríggjar mánaðir, tá teimum beyðst møguleiki at sleppa heim til Føroyar við skipi.

Ein av føroysku útróðrarbátunum í Tokusak gjørdist vrak orsakað av einum eldsbruna, og manningin var tí noydd at fara heim aftur. Hetta varð gjørt við trolaranum Fiskanes.

Tað unga og forelskaða parið spurdi seg fyri, um tey kundu sleppa heim við teimum, og soleiðis bleiv tað til tað at Martha á fyrsta sinni kom til Føroyar, eftir ein átta daga langan siglitúr í góðum líkindum.

– Eg hevði hug at vita, hvussu tað sá út í heimlandinum hjá Dánjali. Og tá eg so kom her til landið,